Brot úr 2001

Tobbi, terror og teldusníkar

2001
Eyðun Klakstein

2001 gjørdist eitt minniligt ár - bæði fyri tað góða og tað ringa. Mest skakandi hendingin í árinum var helst yvirgangsatsóknin í USA, sum hevði við sær veruligt kríggj í Afghanistan. Heimsbúskapurin varð ávirkaður av hesum, og eisini heima hjá okkum merkist ófriðurin og tað, sum kom í kjalarvørrinum.

Tað vóru eisini hendingar á heimaliga pallinum, sum vóru minniligar. Ein av teimum var, at eftir 10 mánaðir segði Tórbjørn Jacobsen seg frá sum landsstýrismaður. Hann hevði gjørt veruliga vart við seg hesar mánaðir, og tá fólkatingsvalið so var hildið, fekk hann dygga undirtøku og endaði á fólkatingið, har eingin góð søga er at siga um hann enn. Men fyri framman bíðar 2002.

Fyrrverandi løgmaður, Marita Petersen, sum við stórum dirvi stýrdi Føroyum í svárastu krepputíð her á landi, doyði. Føroyingar vóru eisini uppi í, tá eitt SAS flogfar datt niður í Italia.

Hetta var eisini árið, tá onkur breyt inn á heimasíðuna hjá bispi. Teldusníkar eru gerandiskostur á internetinum, og nú helt onkur, at tíðin var komin til at arga bisp.

Á næstu síðunum hava vit savnað nakrar av søgunum frá 2001. Her er ikki talan um nakað fullfíggjað yvirlit, men heldur brot úr árinum. Og tað eru ikki altíð tær mest týðandi politisku søgurnar, sum eru tiknar við, men heldur eitt fjøltáttað úrval av tí, sum føroyingar tókust við í árinum.

Sosialurin letur upp redaktión í Norðoyggjum

Eirikur Lindenskov, blaðstjóri á Sosialinum, hongur skelti upp í Klaksvík

Januar: Endamálið við hesi nýggju deildini í Norðoyggum er at koma meira víða kring landið og at gera Sosialin meira sjónligan uttan fyri miðstaðarøkið

Fríggjadagin 26. januar lat Sosialurin upp deild í Klaksvík.

Sosialurin hevði framman undan havt blaðfólk í Klaksvík í eina tíð, men í januar gjørdi blaðið av, at tað varð lagt veruligt grundarlag undir eina sjálvstøðuga redaktión, sum burturav skuldi hava til uppgávu at røkja tíðindaflutningin úr Norðoyggjum.

Jan Müller, blaðstjóri á Sosialinum, segði, at blaðið leingi hava arbeitt við hesum ætlanum.

- Nú tøknifrøðin er so framkomin, er tíðin komin til gera ætlanina til veruleika. Í hesum sambandi hevur blaðið eisini innrættað seg væl og fingið til vega ta mest nýtímans útgerðina, segði hann.

Jan Müller vísir annars á, at tað er ikki av tilvild, at Sosialurin hevði valt Norðoyggjar til hesa fyrstu veruliga redaktiónina uttan fyri høvuðsstaðin.

- Fyri tað fyrsta er Klaksvík næststørsti býurin í landinum, og harnæst eru Norðoyggjar eitt av okkara mest týðandi fiskivinnuøkjum.

Havnin gera.

- Stóri brølarin var, at løgtingið ikki gjørdi av, at útgerðarhavnin skuldi verða í Suðuroy, helt Henrik Old, tingmaður fyri Javnaðarflokkin.

- Tað undrar meg stórliga, at Suðuroyggin ikki so frætt sum sleppur at bjóða upp á útgerðarhavnina, segði hann.

- Hetta er ein keðilig støða, men soleiðis kann tað enda, tá tú telvar við teimum stóru, helt Flemming Mikkelsen, tingmaður fyri Sambandsflokkin.

Suðuroyingar í øðini

Januar: Politikarar, vinnulív og fólk í Suðuroy vóru vónbrotin, tá Suðuroyggin varð útilokað frá at fáa útgerðarhavnina til oljuvinnuna

Suðuroyingar vóru alt annað enn fegnir, tá oljufeløgini gjørdu av, at útgerðarhavnin til oljuvinnuna skuldi verða í Runavík ella Havn.

Hóast nógv tosaðu fyri, at útgerðarhavnin skuldi leggjast í Suðuroy, so hevði politiski myndugleikin lagt upp í hendurnar á oljufeløgunum at gera, hvar útgerðarhavnin skul verða. Og tey lótu ikki Suðuroynna sleppa at bjóða upp á hesa havn. Tað skuldu Runavík og

Tá SMS boð gerast ein plága

Januar: Fyritøkur og onnur hava fingið ein nýggjan, ókeypis og sera ómakaleysan hátt at marknaðarføra seg, nevniliga við at senda lýsingar sum SMS boð.

Í januar mánaði fingu at kalla allir føroyskir fartelefonfelagar fingið eini SMS boð, har ein konsertfyrireikari lýsir við, hvar atgongumerki til konsertina kunnu keypast, og hvussu nógv tey kosta. Og undan býráðsvalinum í fjør fingu mong eisini SMS boð við áheitan frá einum valevni í Havn um at velja seg.

Men hesin dreymurin hjá lýsaranum um ein nýggjan og bíligan hátt at lýsa við kann lætt gerast ein marra hjá móttakaranum, tí eingin føroysk lóg verjir fartelefonfelagar frá ágangandi lýsarum.

- Einki juridiskt liggur til hindurs fyri hesum slagi av marknaðarføring, men tað stríðir ímóti teirri grundhugsjón, sum kemur fram í til dømis teirri donsku marknaðarføringslógini, um at fólk skulu hava møguleika at siga nei takk til at fáa lýsingar, sigur Jógvan Thomsen, stjóri á Fjarskiftiseftirlitinum.

Tað er lætt umvegis serlig forrit at senda SMS boð til nógvar fartelefonir í senn.

Føroyskur brævbjálvi fyri 30.000 krónur

4. januar: Tað kann verða eitt gott hugskot at goyma brævbjálvar, tí eftirtíðin lønar slíkum sera væl

Nógvur peningur kann vera at fáa, um tú hevur okkurt gamalt og áhugavert bræv liggjandi í óruddinum á loftinum. Onkur hevur í øllum førum gjørt kubbi við at selja eitt gamalt føroyskt bræv á uppboðssølu á Børsen í Keypmannahavn.

Talan var um ein brævbjálva, sum varð sendur til Føroya Banka í Tórshavn tann 23. januar 1919. Brævið varð eisini sent úr Havnini, og frímerkini høvdu tá eitt virði á 22 oyru.

Tað, sum samlarar halda vera áhugavert við brævinum, er, at tvey av frímerkjunum er skrødd.

- At frímerkini eru skrødd vísir, at hetta brævið ikki er gjørt til samlarar, men at tað veruliga hevur verið í brúki. Hetta er orsøkin til, at tað hevur so stórt virði. Tá í tíðini vóru tað bara Føroya Banki og handilsmenn, sum fingu hesi 2 oyru frímerkini, sigur Suni Vinther, frímerkjasavnari, sum var til staðar á uppboðssøluni.

Brævbjálvin varð seldur fyri 30.000 krónur.

- Tað eru nógv fólk, sum halda, at eitt skrætt frímerki ikki hevur nakað virði, men ein skal ongantíð tveita nakað gamalt burtur, uttan at onkur serkønur á økinum hevur hugt at tí fyrst, sigur Suni Vinther.

Í Føroyum er áhugin fyri filateli ikki serliga stórur. Á vanligum fundum hjá filatelistfelagnum møta eini tíggju fólk hvørja ferð, men felagið hevur eini 25 limir.

Ólóglig gengransking í Føroyum

Januar: Týski barnalæknin, Ulrike Steuerwald, varð meldað til fútan fyri at hava tikið blóðroyndir frá føroyingum til gengransking. Neyðugu loyvini frá vísindasiðseminevndini vóru ikki fingin til vega til hesar royndir

Ulrike Steuerwald varð meldað til løgregluna

Í januar mánaði kundi Sosialurin bera tey boðini, at virdi týski granskarin Ulrike Steuerwald varð meldað til løgregluna fyri ólóglига gengransking í Føroyum.

Ulrike Steuerwald hevur arbeitt í Føroyum í fleiri ár, men starvast nú í Hannover í Týsklandi. Hon var farin undir at kanna sjúkuna vøddasvinn, og granskingin skuldi fara fram á University Hospital í Nijmegen í Hollandi.

Hetta var gjørt í samstarvi við foreldur at børnum við sjúkuni. Familjulimir hjá sjúklingum vórðu spurdir, um teir høvdu hug at lata blóð til granskingina, og tað stóð fólki frítt at velja. Tey, sum vildu vera við, skuldu møta upp á Landssjúkrahúsinum, har royndirnar vórðu tiknar.

Høgni Djurhuus, formaður í vísindasiðseminevndini, segði við Sosialin, at nevndin ikki hevði fingið nakra umsókn til hesa granskingina hjá Ulrike Steuerwald, og tískil fyrilá heldur eingin góðkenning frá nevndini.

- Tað, sum nevndin fyrst og fremst hevur í huganum, tá støða verður tikin til umsóknir, er, at granskingin kemur øllum samfelagnum til góðar. Endamálið er, at samfelagið fær ágóðan av granskingini. Annað av aðalmálum okkara er, at blóðgevarnir eru tryggir. Teir skulu hava ta neyðugu upplýsingina um granskingina áðrenn, segði Høgni Djurhuus.

Nógv kjak stóðst av hendingini, og næstu tíðina viðgjørdu flestu av føroysku fjølmiðlunum málið

Brot úr 2001

Russi mundi gjørt av við Smyril

Januar: Tað var um reppið, at Smyril rendi saman við einum russiskum trolara beint út fyri molan í Havn

Tað var maskinorkuni og skjóta atburði skiparans fyri at takka, at túrurin við Smyrli av Drelnesi til Havnar týsmorgunin 16. januar ikki endaði við einari vanlukku.

Tá Smyril nærkaðist Molanum við 72 ferðafólkum umborð og skuldi til at sneiða inn um, kom brádliga ein russiskur trolari undan Norrönu, sum lá ytst við Molan. Trolarin sneiddi beint út fyri Smyril, sum enn hevði nógva ferð á.

- Eg gjørdist ógvuliga kløkkur, tá eg sá russiska trolaran. Støðan var álvarsom, og gjørdi eg tí av at sláa bakk og snara beinan vegin, greiddi Pauli Larsen, skipari á Smyrli, frá eftir hendingina.

Pauli Larsen metti, at fjarstøðan millum Smyril og russiska trolaran var umleið 300 metrar, tá hannló bakk.

- Tað tekur tó eina løtu, frá tí, at tú slært bakk, til eitt skip fer at bakka. Men tíbetur hevur Smyril góða maskinorku, og tí eydnaðist tað okkum at koma undan.

Var Smyril komin longur inn, áðrenn skiparin uppdagaði russiska trolaran, var tó ikki vist, at tað hevði eydnast at bakka og sneitt undan. Smyril hevði tá verið so nær grótkastinum, at vandi hevði verið fyri, at valið hevði staðið ímillum at rent saman við trolaranum ella inn í grótkastið.

Gongur strúkandi hjá TeleF:

Fær 30 nýggjar kundar um dagin

Februar: Tað hevur gingið nógv betur enn væntað, sigur Billy Hansen, stjóri í nýggja telefelagnum TeleF

»Tú skuldi skift«, sigur TeleF í lýsing, sum fyri góðari viku síðani varð send til øll húsarhald í Føroyum. Og eftir hetta lýsingarátak hava fleiri valt henda útbjóðaran av teletænastum.

Fyrsti kappingarneytin hjá Føroya Tele hevur havt eina strúkandi byrjan. Góða byrjanin hevur sjálvt tikið starvsfólkið hjá TeleF á bóli, tí tey høvdu ikki væntað at undirtøkan fór at vera so góð beinanvegin.

Felagið byrjaði alment at taka ímóti nýggjum kundum 14. desember, men ferð kom ikki á, fyrr enn TeleF hevði sett lýsingarátakið í verk fyri góðari viku síðani, og síðani lýsingarnar hava eini tredivu valt at skifta til TeleF um dagin.

- Vit eru stak væl nøgd við byrjanina, og nú nærkast kundatalið teimum trý hundrað. Okkara mál er at náa túsund kundum innanfyri tann næsta mánaðin, sigur Billy Hansen, stjóri.

Skjótt fer tað triðja telefelagið at bjóða seg fram á marknaðinum. Tað er felagið Alnót, sum enn ikki hevur loyst frá landi.

Billy Hansen heldur, at tað var ein fyrimunur hjá teimum at vera fyrst at taka kappingina upp við Føroya Tele.

- Eg haldi avgjørt, at tað er ein fyrimunur at vit eru fyrsti kappingarneyti hjá Føroya Tele, tí so eru vit fyrst at fáa fatur á teimum, sum høvdu ætlað sær at skift frammanundan. Tað verður torførari at fáa tey at skifta frá okkum til ein triðja, sigur stjórin í TeleF.

(Seinni í árinum løgdu Tele F og Alnót, sum gjørdist til Kall, saman í eitt felag, blðm.).

Bara ein hernaðarmyndugleiki í Føroyum

Januar: Donsku myndugleikarnir kunngjørdu, at alt hernaðarvirksemi hjá teimum í Føroyum verður flutt í Mjørkadal

Tað verður ofta hildið, at hernaðarligt virksemi gongur fyri seg í tí dulda. Tað gera tað eisini ofta, men tá donsku myndugleikarnir gjørdu av, at alt teirra hernaðarliga virksemi í Føroyum skuldi flyta saman, hildu teir ein tíðindafund fyri føroysku pressuni.

Har greiddu teir frá, at Flyvestation Torshavn í Mjørkadali og Færøernes Kommando við Hoyvíksvegin verða løgd saman til eina stað, sum kallast Færøernes Kommando, og hon skal halda til í Mjørkadali.

Jesper Dinesen varð samstundis alment settur sum leiðari av nýggja danska myndugleikanum í Føroyum, Færøernes Kommando í Mjørkadali, meðan Erik Præstegaard, sum hevði leiðslan í Mjørkadali, verður starvsfólkaleiðari.

Hóast tað alment varð boðað frá samanleggingini í januar, so verður sjálv samanleggingin ikki framd fyrr enn komandi ár. Ætlanin er, at hølini við Hoyvíksvegin standa tóm á sumri í 2002.

Í januar vóru 107 fólk knýtt at teimum báðum støðunum, men tá samanleggingin er framd, verða bara 80 fólk á støðini. Av hesum eru eini 10 sivil.

Næmingar landa Næraberg

Skúlanæmingunum í Klaksvík dámdi væl at sleppa til arbeiðis

Februar: Skúlastjórin í Ósáskúlanum í Klaksvík gav 45 næmingum frí í tveir dagar, so teir kundu landa Næraberg

Tá Næraberg kom aftur av túri í ES sjógvi suðuri móti Írlandi, var stórur flokkur av skúlanæmingum í Klaksvík til reiðar at landa skipið.

Veiðan hjá Næraberg verður løgd upp hjá Northern Fish Cold Storage í Klaksvík, og tað er umráðandi fyri reiðaríið, at skipið verður landað sum skjótast, so tað kann sleppa aftur til fiskiskap.

Tí var samband millum Ósáskúlan og reiðaríið um at fáa skúlanæmingar at veita eina hjálpandi hond. Stundum stendur á at fáa nóg mikið av fólkið, um arbeiðast skal í fleiri yaktum.

Stjórin í Ósáskúlanum játtaði, at eini 45 næmingar í 9. flokki skuldu sleppa til arbeiðis.

- Eg rokni við, at næmingarnir kunnu læra nógv av hesum døgunum. Hetta er eitt áhugavert samstarv, sum sjálvandi ikki skal misbrúkast, sigur Símun Petur Hjelm, stjóri í skúlanum við Ósánna.

Klaksvíkingur røddi ímóti rasismu í Bergen

Februar: Kurvaboltsstjørnan og hálvi føroyingurin Calix Blak helt í farnu viku røðu, tá 5000 fólk í Bergen mótmæltu óhugnaligum rasistiskum drápi í Noregi

Calix Black vaks upp í Klaksvík, men er nú kendur kurvaboltsspælari í Noregi

Norska samfelagið er skakað av drápinum á unglingin Benjamin Hermansen, sum verður sagt at verða eitt rasistiskt dráp.

Mótmælisgongdir hava verið kring alt Noregi, har fólk gjørdu vart við, at tey góðtóku ikki slíka harðliga framferð í norska samfelagnum.

Í Bergen vóru eini 5000 fólk við í eini stillari kyndlagongu í miðbýnum, og umframt borgarstjóran í Bergen røddi myrka kurvaboltsstjørnan Calix Blak Ndiaye, sum hevur føroyska mammu og brúkti stóran part av barnaárunum í Klaksvík.

- Hetta hava verið nakrir syrgiligir dagar, men um vit standa saman, eru vit sterk, segði Calix millum annað í síni røðu til tey mongu fólkini.

Calix Blak er mest lovandi kurvaboltsspælarin í Noregi, og í januar mánaði var hann valdur besti spælarin í norsku kappingini.

Mamman er úr Klaksvík og pápi hansara úr Senegal, og seinastu árini hevur Calix búð saman við familju síni í Bergen.

- Eg varð biðin um at halda eina røðu í sambandi við kyndlagongdina, og tað mátti eg siga ja til. Hetta er eitt ógvuliga týðandi mál, sigur Calix á góðum føroyskum norðanmáli.

Nú tosa deyv í fartelefon

Februar: Við at senda stutt skrivlig boð gjøgnum fartelefon hava tey deyvu fingið eitt nýtt og ómetaliga hent samskiftisamboð

Tað eru ikki bara ungir skúlanæmingar, sum veruliga hava tikið SMS-boðini til sín. Eisini tey deyvu hava varnast henda nýggja samskiftishátt og brúka hann nógv.

Maria Ellefsen er deyv og er eisini formaður í Deyvafelagnum. Hon hevur havt fartelefon í næstan eitt ár, og hon sigur, at síðan hon fekk henda møguleikan, er hennara persónliga frælsi økt nógv.

- Eg kann nú í størri mun velja sjálv, hvønn eg seti meg í samband við, og hvønn eg vil samskifta við. Sum deyvur hevur tú ikki altíð so stóra ávirkan á slík viðurskifti. Eg kenni meg ikki so bundna at øðrum longur, sigur Maria.

Fyrr var tað ofta so, at onkur mátti ringja fyri Mariu, tá hon skuldi seta seg í samband við onkran vin ella arbeiðsfelaga. Hesum ræður hon meira sjálv yvir nú enn áður.

- Ofta var eg noydd at brúka foreldrini sum millumlið, tá eg skuldi lata boð frá mær, og tað er ein stórur lætti at sleppa frá hesum. Nú sendi eg boðini beinleiðis til viðkomandi við telefonini. Soleiðis kann eg hava mítt privatlív privat, leggur Maria læandi afturat.

Fekk bóltin aftur úr Íslandi

Mars: 10 ára gamli Andrias, sum býr í Saltangará, fekk um dagarnar ein pakka úr Íslandi. Í pakkanum var ein bóltur, sum Andrias misti á sjógv í Føroyum fyri meira enn fimm árum síðan

Andrias saman við bóltinum, sum hann fekk aftur úr Íslandi

Bólturin hjá tí nú 10 ára gamla Andriasi Troest Hansen úr Saltangará fór á sjógv fyri hálvumsætta ári síðan og varð burtur. Men nú er hann afturkomin. Av Norðurlandinum í Íslandi.

Tey vóru familjuútferð í Dali, tey hjá Andriasi. Og smádreingirnir spældu bólt, sum teir eru vanir. Ter brúktu bóltin hjá Andriasi, sum mamman hevði verið so fyrivarin at skriva navn og telefonnummar á, um han skuldi blivið burtur.

Men tað hjálpti bara einki, tá hann fór á sjógv í Dali og rak til havs, hildu tey.

Men fyri umleið einum mánað síðan ringdi telefonin hjá Andriasi og teimum. Úr Íslandi. Ein kona fortaldi teimum, at tey høvdu ein bólt, sum Andrias átti. Og tey vildu fegin senda bóltin aftur til Føroya.

Tað gingu nakrir dagar, so kom bólturin í einum pakka. Saman við einum korti, sum vísir, hvar hann er funnin og einum lokalblaði, har maðurin, sum fann hann, hevur greitt frá hesum bóltinum.